granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn
Tel + 298 567800
gransking@gransking.fo
www.gransking.fo

# Hálvur høgguslokkur

**Granskingarráðið sóknast eftir einum fólki at taka sær av ymsum skrivstovuarbeiði, fyriskipan av tiltøkum o.a.**

**Vit hava brúk fyri:**
Einum fleksiblum fólki við royndum og/ella evnum innan hesi øki:

- elektroniska journal
- bókhaldskipanina hjá Gjaldstovuni
- kunning og samskifti

Tú mást eisini kunna átaka tær aðrar fyrifallandi uppgávur, stórar og smáar.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt hálvtíðarstarv við fyribils setan til 31.12.2011, við møguleika fyri leinging.
Eitt litið arbeiðspláss í hugnaligum umhvørvi.
Fjølbroyttar uppgávur við frælsi at skipa arbeiðið innan avtalaðar karmar.

Setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið ella annað avvarðandi yrkisfelag.

**Um okkum:**
**Formliga:**

- umsita vit Granskingargrunnin, sum stuðlar verkætlanum við uml. 7 mió kr. árliga.
- eru vit skrivstova hjá Granskingarnevndini og Vísindaráðnum
- ráðgeva vit Landsstýrinum í granskingarpolitiskum spurningum
- eru vit sambindingarlið millum ES og Føroyar á granskingarøkinum FP7
- luttaka vit í norðurlendskum samstarvi um gransking

**Tað merkir, at vit:**

- eru í dagligum samskifti við granskarar, stovnar og virkir um stuðlaðar verkætlanir og um komandi verkætlanir
- arbeiða neyvt saman við miðfyrisiting og politisku skipanini um granskingarpolitikk
- ráðgeva í sambandi við føroyska luttøku í ES-granskingarskránni FP7 og í norðurlendskum samstarvi
- kunna um gransking og granskingarúrslit, m.a. á www.gransking.fo, í e-tíðindabrøvum, á Vísindavøku og øðrum tiltøkum

*Les meira um okkum á www.gransking.fo ella set teg í samband við Anniku Sølvará, stjóra, á tel 567800 fyri at fáa fleiri upplýsingar.*

**Umsókarfreistin er 11.11.10.**
Umsóknir við avritum av prógvum v.m. kunnu sendast við telduposti til annika@gransking.fo ella við posti til: Granskingarráðið, Bryggjubakki 12 Postrúm 259, 110 Tórshavn.

# Skipsmaskinistur

Strandfaraskip Landsins søkir hervið eftir einum skipsmaskinisti. Freistin at søkja starvið er fríggjadagin tann 26. november 2010 kl. 12:00. Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Farloyvisstarv sum leiðari á Barnagarðinum á Mýrunum

Runavíkar kommuna søkir eftir leiðara til Barnagarðin á Mýrunum í tíðarskeiðnum frá 01.01.2011 til 31.10.2011.

Í Barnagarðinum á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 serstova. Umstøðurnar eru góðar við ljósum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørðslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavant og nær við ítróttarøkið.

**Starvið**
Leiðarin hevur fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum. Leiðarin hevur ábyrgd av:

- at stovnurin er í støðugari menning,
- at starvsfólk trívast og mennast,
- at tað støðugt verður arbeitt við at menna námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og treytunum, sum stovnurin virkar undir.
- At samstarva við kommunalu umsitingina, við aðrar leiðarar innan barnaansingina og við aðrar viðkomandi stovnar

**Vit leita eftir leiðara, ið**

- er útbúgvin námsfrøðingur og hevur leiðsluroyndir
- kann arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum stovni, ið rúmar vøggustovu, barnagarðsstovu og serstovu.
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at orða seg munnliga og skrivliga
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya á lønarstig 26-32

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000 ella Eyðnu Norðfoss, leiðara á tlf. 218254

**Søk starvið**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. nov. 2010, kl. 12:00.

**Runavíkar kommuna**
Heiðavegur 26 · Postsmoga 139 · FO-600 Saltangar

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv. ft.

# Til sølu

Um hóskandi boð fæst eru 8 gyllin
í Suðurhelvt til sølu.

Nærri upplýsingar um jørðina fáast
við at venda sær til undirritaðu:

Fríða Patursson, frp@jura.fo ella
skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen aro@jura.fo

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn
Tel 35 33 35 · Fax: 35 33 36 · www.jura.fo

# FISKA MERKIR

**Seinasta freist
at lata fiskamerkir inn,
sum skulu luttaka í lutakasti
um 12.500,- kr. er
19. november 2010**

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE
www.hav.fo

# ÍBÚÐ TIL SØLU

**ÍBÚÐ Í MARITUGØTU
TIL SØLU**

**TEL. 218154**

Sosialurin 341800